*-Vit vistu ikki, at Golfstreymurin kundi steðga. Vit vistu ikki, hvat tað var*
*(bretskur granskari).*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEXT@MAIL.DK



STUTT SAGT

## Lurtaði ikki

Loftferðslumyndugleikarnir í Nigeria hava hug at geva flogskiparanum skyldina av, at eitt flogffar datt niður har sunnudagin. 96 av teimum 104, sum vóru í flogfarinum, doyðu. Flogfarið var júst farið á flog av flogvøllinum í høvuðsstaðnum Abuja, tá tað datt niður, men nú siga myndugleikarnir, at eftirlitstornið á flogvøllinum ráddi flogskiparanum frá at fara á flog, tí veðrið var so vánaligt. Nigeriski ráðharrin í samferðslumálum sigur, at í framtíðini skulu flogskiparar laga seg meiri eftir tí, sum eftirlitið sigur teimum. Millum teirra, sum doyðu í vanlukkuni, var andaligi leiðarin hjá nigerisku muslimunum.

## Drukna í regni

Regntíðin hevur verið sjáldsama drúgv har suðuri í India í ár, og teir seinastu fjúrtan dagarnar hevur tað nógva avfallið kostað 47 mannalív. Indisku myndugleikarnir halda, at síðani regntíðin byrjaði, eru umleið 1.000 fólk druknað ella deyð í skriðulopum. Í landspartinum Tamil Nadu standa stór øki undir í vatni, og í Andhra Pradesh hevur nógvur vindur eisini gjørt stóran skaða. Meiri enn 70.000 fólk eru flýdd undan tí nógva regninum, og tey hava fingið skjól í skúlum og øðrum almennum bygningum.

## Noreg dálkar illa

Hóast Noreg hevur staðfest Kyoto-sáttmálan og bundið seg til at avmarka dálkingina, gongst tað sera striltið hjá norðmonnum at halda krøvini. Millum annað hevur Noreg bundið seg til, at landið skal ikki dálka meiri í 2008, enn tað gjørdi í 1990, men longu nú er greitt, at tað lyftið kann landið ikki halda. Kanningar vísa, at í dag dálkar Noreg 10 prosent verri enn tað, sum er ásett í Kyoto-sáttmálanum, og at í 2010 fer Noreg at dálka 20 prosent meiri enn ásett, um einki munagott verður gjørt beinanvegin. Tann stóri syndarin er oljuvinnan, sum letur nógv veðurlagsgass út í luftina.

# Golfstreymurin stóð stillur í tíggju dagar

**Bretskir granskarar vilja vera við, at Golfstreymurin stóð stillur í tíggju dagar í 2004.**




-Vit hava ongantíð sæð nakað slíkt. Vit vita ikki, hvat hendi, og vit vistu heldur ikki, at slíkt kundi henda, sigur granskarin Harry Boyden, sum greiddi frá tí sjáldsama tilburðinum á einari ráðstevnu í Birmingham herfyri, skrivar blaðið The Guardian.

Harry Boyden arbeiðir á havgranskingarstovninum í Southampton, sum millum annað hevur kannað Golfstreymin í fleiri ár.

Amerikanski granskarin Lloyd Keigwin sigur við The Guardian, at tað, sum hendi Golfstreyminum í november í 2004, er tað størsta broytingin, sum veðurlagsgranskarar hava sæð higartil.

-Tað vardi bara tíggju dagar, men hvat nú um streymurin steðgaði í 30 ella 60 dagar? Vit kunnu heldur ikki siga, at tað ikki fer at henda næsta ár, sigur Lloyd Keigwin.

Granskarar hava leingi sagt, at tað kann væl henda, at Golfstreymurin fer at broytast, og at hann í ringasta føri fer at steðga orsakað av tí veksandi hitanum á Jørðini. Skuldi tað hent, at Golfstreymurin steðgar, fer meðalhitin í Evropa væntandi at fella millum fýra og seks stig í einum tjúgu ára skeiði.

Summir granskarar siga, at enn hevur vísindin ikki staðfest nakrar varandi broytingar í teimum stóruhavstreymunum.



*Bush fer ikki at hjálpa Japan, Suðurkorea og Taiwan at gera kjarnorkuvápn.*

## Fáa ikki hjálp úr USA

**Japan, Suðurkorea og Taiwan fáa ikki amerikanska hjálp til at útvega sær kjarnorkuvápn.**

Tey trý londini í Fjareystri kenna seg ikki trygg, nú Norðurkorea hevur roynt sína fyrstu kjarnorkuløðing, og tey vilja tí hava fatur á kjarnorkuvápnum fyri at varðveita javnvágina.

**Men tey fáa ikki hjálp úr USA.**

-Tess færri kjarnorkuvápn eru í Fjareystri, tess tryggari kann heimurin kenna seg, segði George W. Bush, forseti, í einari sjónvarpssending í gjárkvøldið.

Hann segði, at USA fer ikki at skunda undir eina vápnakappdubbing í Fjareystri, men hann segði seg skilja, at grannalondini hjá Norðurkorea kenna seg ótrygg, tí einki kemur burtur úr royndunum at fáa Norðurkorea at sleppa sínum kjarnorkuætlanum.



*Hillary Clinton fær óvæntaðan stuðul.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Hillary óvæntaðan stuðul

**Tað stóra, konservativa blaðið The New York Times mælir nú sínum lesarum til at velja demokratiska senatorin Hillary Clinton aftur í Senatið.**

Tilmælið frá blaðnum kemur rættiliga óvart á mong, tí nógvir av teimum konservativu amerikanarunum meta Hillary Clinton sum tann størsta politiska fíggindan.

Á senatsvalinum fyri fýra árum síðani fór The Nrw York Times sera illa við Hillary Clinton. Eitt nú ávaraði blaðið veljararnar í New York við at siga, at tað var landasvik at velja hana.

Nú skrivar blaðið, at hon hevur víst seg at vera meiri miðsøkjandi í politikki, enn blaðið væntaði, og tí mælir tað sínum lesarum til at velja hana á miðvalinum næsta týsdag.